# PINK er livandi og live

**Mikudagin klokkan 15 fer ungdómssendingin »Pink« fyri fyrstu ferð beinleiðis í luftina á Rás 2. Í hesum sambandi hava vit fingið okkum eitt lítið prát við teir tríggjar vertirnir Ragnhild, Heiðu og Sóleyð**



**RÁS 2**
*Annika Hedegaard Isfeldt*

Hóast tær ikki vilja út við, hvat fyrsta sendingin mikudagin kemur at snúgva seg um, siga tær tríggjar, at tað avgjørt verður spennandi at tendra fyri útvarpinum kl. 15 í morgin.

- Vit kunnu sjálvandi ikki avdúka, hvat sendingin í morgin kemur at snúgva seg um, tí soleiðis er journalistikkur jú, sigur Ragnhild og smílist.

Hóast tær hava onkrar royndir innan journalistikk, er tað fyrstu ferð, at tær tríggjar fara undir at arbeiða innan útvarp.

- Vit halda tað vera eina spennandi avbjóðing, og tað var eisini tí, vit søgdu ja til at hava sendingina, tá ið Rás 2 spurdi okkum. Vit gleða okkum sera nógv til at síggja, hvussu alt fer at rigga, siga tær.

## Lurtarin er miðdepilin

Hóast sendingin er ein ungdómssending, halda genturnar, at onnur fólk eisini kunnu lurta eftir henni. Nógv ungdómsevni verða sjálvandi tikin upp, men tær meta, at tað eisini verður okkurt, ið er áhugavert fyri øll, tí tær fara eisini at taka evni upp, sum eru nógv uppi í tíðini.

- Sendingin verður væntandi bæði lærurík og stuttlig, sigur Heiða.

- Vit eru nevniliga als ikki bangnar fyri tabuevnum.

Enn er ikki heilt greitt, hvat innihaldið í sendingini fer at verða. Hetta siga tær er orsakað av, at pláss skal vera fyri tí einstaka lurtaranum. Tær ætla at halda ymisk tiltøk fyri at fáa lurtaran meira við. Hetta umfatar m.a. livandi tónleik, ymiskar kappingar og kjak. Tær vóna, at »Pink« kann gerast eitt sindur øðrvísi enn hinar sendingarnar við tað, at hon bæði er ungdommilig og upplýsandi.

Den som intet vover, intet vinder, endar Ragnhild við einum smíli.

Sendingin verður at hoyra beinleiðis á Rás 2 hvønn mikudag kl. 15-17.





**PARTABRØV Í UNDANVINDI**

Evropisk partabrøv hækkaðu fjórðu viku á rað og liggja í dag 1,5% hægri enn fyri viku siðan. Ein av orsøkununum er, at mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA, sum var kunngjørd fríggjardagin, gjørdist betur enn væntað, tá 10% fleiri størv vóru stovnsett. Heraftrat bleiv seinasta frágreiðingin uppmett í so stóran mun, at talan kann hava verið um eina villu í tí seinastu. Um so er, var seinasta rentulækking uppá 0,50% bygd á partvíst skeivt grundarlag. Tí er ivasamt, um amerikanski tjóðbankin lækkar rentuna til næsta rentufund seinast í mánanum ella bíðar til desembur. Frágreiðingin vil í fyrstu atløgu ávirka positivt, men neyðugt er at hyggja nærri at hvussu veiki húsamarknaðurin rakar arbeiðsmarknaðin.

Stóri bankin Merrill Lynch kunngjørdi eitt minni tap uppá partabrævið enn væntað fyri 3.ársfjórðing. Hettar fekk fíggjarpartabrøv at hækka, Tí lítla hallið uggaði íleggjarnar sum tó framvegis kenna seg ótryggar, tí teir ikki kenna vavið á sub-prime kreppuni. Men so hvørt sum bankaroknskapir verða kunngjørdir, koma árinini av kreppuni til sjóndar og fer hetta at ávirka gongdina á partabrøvum.

**BRETSKA PUNDIÐ HÆKKAR**

Góðu tíðindini ávirka eisini gjaldoyruni. Dollarin liggur á 5,31 sum er 1,2% hægri enn fyri viku síðan. Bretska pundið er hækkað stútt síðan lækkingina fyri góðum tveimum vikum síðan og liggur nu á 10,78. Íleggjarar átaka sær sum heild størri váða, og sæst tað aftur á gjaldoyrakursinum í vakstrarbúskapunum sum hækka.

**RENTURNAR ÓBROYTTAR**

Renturnar eru óbroyttar í mun til fyri viku síðan. 10-ára lánsbrævarentan er 4,44%.

**HESA VIKUNA**

Hesa vikuna verður áhugavert at hoyra nærri frá rentufundinum í FED og hvat lá til grund fyri stóru rentulækkingini seinast. Eisini kunnu tøl úr USA um nýtsluna og brúkaraálitið fyri septembur mánaða, geva eina ábending um, hvussu kreppan á lánimarknaðinum hevur ávirka hesi.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK